HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS



# Sjúkrakassagjaldið verður avtikið

Tann 1. januar 2010 fáa føroyingar eina nýggja heilsutrygd. Samstundis fer gamla skipanin við sjúkrakøssum og sjúkrakassagjaldi úr gildi.

Ístaðin fer TAKS at innkrevja gjald til nýggju almennu heilsutrygdarskipanina, sum kallast Heilsutrygd. Gjaldið verður eins fyri øll – 245 krónur um mánaðin, galdandi frá januar 2010. Børn undir 18 ár gjalda einki.

Eftir ætlan verður fyrsta gjaldið kravt inn síðst í februar, tí tað tekur tíð at fyrireika nýggju innkrevjingarskipanina. Síðani verður heilsutrygdargjaldið kravt inn mánaðarliga. Kunnað verður nærri um hetta í næstum.

**Limagjaldið strikað sjálvvirkandi**
Meginfelag Sjúkrakassa Føroya hava gjørt avtalu við peningastovnarnar um, at allar fastar flytingar av limagjaldi til sjúkrakassarnar sjálvvirkandi verða strikaðar, galdandi frá 1. januar 2010.

Við hesum er ikki neyðugt at fólk sjálvi skulu gera meir við sjúkrakassagjaldið.

*Heilsutrygd er nýggj almenn heilsutrygdarskipan, ið tann 1. januar 2010 kemur fyri gomlu skipanina við 11 sjúkrakassum kring landið. Endamálið við nýskipanini er at tryggja øllum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.*

HEILSUMÁLARÁÐIÐ · EIRARGARÐUR 2 · 100 TÓRSHAVN · TEL 30 40 50 · FAX 35 40 45 · HMR@HMR.FO · WWW.HMR.FO

---

# KOYRIKORT

TEORISKEIÐ - ENDURTØKA - TAXA - R.F.SKEIÐ

**Nýtt teoriskeið byrjar á Niðaravegi 11 í Søldarfirði 6. JANUAR KL 16.00**



ANDREA ISAKSEN - TEL.: 21 16 87

---



# Kundaráðgevi

til Suðuroyar Sparikassa í Havn

**Vilt tú vera við til at seta kundan í fokus? Vilt tú gerast ein týðandi leikari á einum nýskapandi liði?**

Suðuroyar Sparikassi søkir eftir kundaráðgeva til deildina í Tórshavn.

**Høvuðsuppgávur**
Ráðgeving av privatkundum, smærri vinnukundum og aðrar vanligar uppgávur í einum peningastovni. Harumframt fært tú ein týðandi leiklut í framhaldandi menningini av Suðuroyar Sparikassa.

**Førleikakrøv**
Peningastovnsútbúgving, men Bankaskúli II ella hægri útbúgving er ein fyrimunur, og tú ert opin fyri persónligari og fakligari førleikamenning.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, ágrýtin og fleksibul. Tær dámar at hava nógv at gera, eins og tær dámar væl fjølbroyttar uppgávur og at fullføra eitt arbeiði.

Hevur tú hug at frætta meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Rúna Heðinson, deildarstjóra, á telefon 239873, á runi@sparsu.fo, ella tú støkkur inn á gólvið á deildini í miðbýnum í Havn.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Suðuroyar Sparikassa, Postboks 374, 110 Tórshavn, att.: Rúni Heðinson, ella til runi@sparsu.fo.

**Umsóknarfreistin er 4. januar 2010 kl. 12.00.**

Vitja eisini heimasíðu okkara www.sparsu.fo

Í Suðuroyar Sparikassa arbeiða 20 fólk. Vit arbeiða saman fyri at veita kundum okkara eina munadygga tænastu og fyri at tryggja framtíðina hjá Suðuroyar Sparikassa. Vit seta kundan í fokus og leggja áherðslu á nýskapan, førleikamenning og hugna fyri okkara kundar.

SUÐUROYAR SPARIKASSI Postboks 2 · 910 Vágur · Fax nr. 359871 · www.sparsu.fo · sparsu@sparsu.fo